


*Marienlyst, sum hesa ferð kundi fegnast um greipuna, hevur nú vunnið seks donsk meistaraheiti í mansflogbólti síðstu sjey árini*

*Mynd: Jens Wognsen*

# Bárður danskur meistari

**FLOGBÓLTUR** Sum hjálparvenjari var Bárður Bendix Mikkelsen í páskavikuni við til at leiða Marienlyst fram til fjórða danska meistaraheitið á rað í flogbólti hjá monnum, umframt at liðið hesa ferð vann greipuna

Hilmar Jan Hansen

Hagtølini hjá Marienlyst tala fyri seg, tí danska meistaraheitið hesa ferð var tað sætta í bara sjey ár. Ígjøgnum kappingina í vetur hevur Marienlyst verið tað frægasta liðið og at finalan um meistaraheitið var ímóti Middelfart lýsti eisini væl, hvussu kappingin hevur sæð út, tí fyrr hetta kappingarárið spældu somu lið steypafinaluna, sum Marienlyst eisini vann.

Tað var mikukvøldið í páskavikuni, at meistaraheitið hjá Marienlyst kom í kassan. Spælt verður soleiðis, at tað av teimum báðum finaluliðunum, ið er best í fimm finalum, vinnur meistaraheitið. Hetta var fjórða finalan millum Marienlyst og Middelfart, sum tó bara vann eina, meðan hetta var tann triði sigurin hjá Marienlyst, ið sostatt ikki kundi takast.

– Nú var eg fyri tveimum árum síðani við til at vinna bæði meistaraheitið, steypakappingina og norðurlendska meistaraheitið við Marienlyst, so tað var sjálvandi nakað heilt serligt, sum gjørdi, at eg róliga kundi gevast sum spælari, tí eg hevði nátt so høgt, sum eg kundi, sigur Bárður Bendix Mikkelsen, sum nú er 34 ára gamal, og hetta síðsta árið hevur verið hjálparvenjari hjá Marienlyst, har hann tó fyrst og fremst stendur fyri talentmenningini í felagnum.




*Bárður Bendix Mikkelsen og hinir í venjaratoyminum hjá Marienlyst fáa gullheiðursmerkini hongd um hálsin*

*Mynd: Jens Wognsen*

– At eg so nú eisini sum venjari kann fáa ein part í greipuni, sum mansliðið hjá okkum hevur vunnið í vetur, er sjálvandi ein stór æra. Tað er deiligt at kunna geva sítt íkast, tí eg havi jú drúgvar royndir og veit, hvat skal til. Hetta er sanniliga eisini deiligt, men upp á ein annan máta, enn tá eg var spælari.

### Gott at gera mun

Undan endaliga sigrinum fyri viku síðani, høvdu teir í Marienlyst vunnið tvær ferðir 3-2, men tapt eina ferð 1-3. Við til søguna hoyrir, at teir í øllum fýra finaludystunum vóru aftanfyri 0-2, men í trimum av teimum fýra dystunum megnaðu teir so at reisa seg og vinna.

– Hetta gjørdust nakrar heilt undarligar finalur, tí vit spældu ikki so væl, sum vit hava gjørt tað fyrr í vetur. Í steypafinaluni, sum eisini var ímóti Middelfart, vunnu vit sannførandi, men í finalunum um meistaraheitið gekk tað meira trekt, sigur Bárður Bendix Mikkelsen, sum hevur sera drúgvar royndir. Eitt nú spældi hann í síni tíð 77 landsdystir fyri Føroyar, umframt at hann í bestu donsku flogbóltsdeildini hevur spælt yvir 400 dystir.

– Júst tað, at vit høvdu roynt alt hetta fyrr, kundi geva okkum vekt aftan fyri orðini, tá vit í hvørjum einasta av hesum fýra finaludystunum skuldu venda gongdini. Tann eina dystin gekk tað ikki, men í hinum trimum riggaði tað, so vit kundu koma afturíaftur og vinna. Tað er gott at gera mun, sum tað er tað, tá tú fært spælararnar at trúgva tí, tú sigur, og at gera eftir tí.

Henda síðsta finalan gjørdist ein spennandi fimmsettari, sum varði í næstan hálvantriðja tíma, so teir yvir 400 áskoðararnir fingu fullan valuta fyri pengarnar. Middelfart vann tey bæði fyrstu settini 25-21 og 26-24, og var enntá á veg at vinna triðja setti, men tá eydnaðist Marienlyst at venda og vinna 27-25. Eisini í fjórða setti sá gott út hjá Middelfart, men so kom gongd á hjá Marienlyst, ið aftur vann 27-25. Í fimta og avgerandi settinum gjørdust dygdirnar hjá Marienlyst alsamt sjónskari, og settið endaði 15-10.

Sostatt var danska meistaraheitið komið til høldar, og Bárður og teir í Marienlyst kundu erpa sær av, at teir megnaðu at vinna meistaraheitið á útivølli. Sum sagt, er hetta sætta meistaraheitið hjá Marienlyst síðstu sjey árini, meðan Middelfart, har Bárður eisini hevur spælt við fyrr, framvegis ikki hevur vunnið meistaraheitið síðani 1977.

*hilmarjan@sosialurin.fo*